# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Bergtóra Jacobsen 80 ár



Hósdagin, 15. desember, fyllir Bergtóra Jacobsen, Grønlandsvegi 37 í Havn, 80 ár. Hennara fulla navn er Malan Bergtóra. Tey flestu siga Bergtóra. Summi fólk úti í Grønlandi, har um vegir, sum hon býr, siga Begga. Tað vóru serliga øll tey hjá Mikkjali í Grønlandi, og Begga hongur við enn.

Bergtóra er ættað av Kirkju í Fugloy, her hon yvirhøvur varð rópt Berga. Hon er dóttir Karolinu (f. Zachariasen) og Gulak Matras, sum bæði vóru av Kirkju. Bergtóra var yngst av fýra systkjum, trimum gentum og einum dreingi.

Longu fýra ára gomul fór hon til Havnar í kostskúla hjá nonnunum, tí mamma hennara var so ring av sukursjúku, at hon noyddist at leita sær heilsubót millum annað í Danmark. Bergtóra gekk í skúla og búði hjá nonnunum í hálvtriðja ár, her hon eisini var við í skótaliðnun hjá teimum. Skótaliðið æt KUP - Kristelige unge piger.

Hon fór til Fugloyar aftur at ganga í barnaskúla, og haðani fór hon til Klaksvíkar at ganga í skúla.

Eftir loknað skúlatíð fór hon aftur til Havnar, millum annað til at tæna sum so mangar ungar gentur tá á døgum. Við sær úr Fugloy hevði hon ein framúrskarandi handligan førning, tí mamma hennara, Karolina, var tiltikið dugnalig til hendurnar. Bergtóra seymaði og heklaði og bant og vav. Í Havn lærdi hon víðari at veva hjá Bergljót av Skarði, og eitt skifti seymaði hon hjá Sigurskjold, skraddara. Bergtóra hevði eisini íbornan musikalitet við sær. Hon spældi bæði orgul og violin, ja, hon spældi enntá til okkurt brúdleyp.

Í 1947 fór Bergtóra til Danmarkar at arbeiða hjá Lukas Stiftelsen. Hon ætlaði at læra til jarðarmóður. Jarðarmóðurskúlin tók til skiftis ein næming inn um árið úr ávikavist Grønlandi og Føroyum, men hetta árið, meðan Bergtóra arbeiddi hjá Lukas Stiftelsen og bíðaði eftir at sleppa inn á jarðarmóðurskúlan, doyr Gulak, pápi hennara, so hon noyddist heimaftur til Føroya.

Í 1949 hitti hon Óla Simonsen, beiggja Marner, Oluf og Erling Simonsen. Óli var sonur Erik hjá Magnus Sivart. Óli var húsasmiður. Bergtóra og Óli giftust á Kirkju á páskum í 1951 í himmalsins ódnarveðri.

Hjúnini fingu tvey børn, Eirik og Káru Gunnu, men longu í 1957 doyr Óli, og Bergtóra sat eftir sum einkja. Hon bjóðaði lívinum av og arbeiddi nógv og hart. Tað var ikki tað plagg, sum hon ikki sjálv seymaði, bant og heklaði uppá børnini, og heima á Grønlandsvegi seymaði og vav hon alt, sum hoyrdi til eitt heim. Úti arbeiddi hon í handlinum, sum æt Tubbak, hjá Restorff á Hotel Hafnia. Tá ið Tubbak læt aftur, fór hon á skrivstovuna á Hafnia at arbeiða. Og eitt skifti var hon á skrivstovuni hjá Føroya Fiskasølu ovast uppi undir takinum í Føroya Banka.

Í 1964 giftust Bergtóra uppaftur við Frits Jacobsen, Frits hjá Gøtu-Anthon. Frits búði í Hornabø í Havn. Tey fingu tveir synir saman, Frits og Anthon, men hjúnunum, Bergtóru og Frits, untust ikki trý ár saman, tí Frits doyði í 1967, og aftur sat Bergtóra eftir sum einkja.

Hon flutti út aftur í Grønland at búgva í húsunum, sum Óli, fyrri maður hennara, hevði smíðað. Bergtóra stríddist og strevaðist, og væl lá fyri, um tað so var at fletta.

Synirnir, Frits og Anthon gingu ongantíð í barnagarð, tí Bergtóra passaði teir sjálv, samstundis við at hon passaði onnur børn, alt ímeðan hon bant skipstroyggjur at selja. Seinnapartin og um kvøldið vaskaði hon í Kommunuskúlanum. Hennara seinasta starv var á Frímerkjadeildini á Argjum hjá Postverki Føroya, her hon arbeiddi, til hon 67 ára gomul fór frá sum pensjónistur.

Øll hesi árini hevur Bergtóra verið sera virkin. Hon var við í Sjómanskvinnuringinum og hevur helst ikki tal á, hvussu nógvar skipstroyggur og hosur, hon hevur bundið sum jólagávur til sjómenn. Hon var við í Kvinnufelagnum í Mettustovu. Hon eigur sín fasta sess í Vesturkirkjuni og í Meinigheitshúsinum við Tinghúsvegin og ikki at gloyma hevur hon trúliga tænt KFUK í Havn.

Nettupp sambandið við KFUK fekk børn hennara at spyrja, um hon ikki kundi sleppa at halda 80 ára føðingardagin á KFUK. Her játtaðu tey alt fyri eitt, og tað er á KFUK, at Bergtóra tekur ímóti hósdagin, 15. desember, frá klokkan 11 til 15. Her væntar hon at bjóða mongum gestum vælkomnum, ikki minst sínum tíggju ommubørnum og fýra langommusynum.

S.

## 116 ár og heimsins elsta!

**Ein kvinna úr Ecuador er kosin av Guinness Rekord bókini til heimsins elsta**

Maria Esther Capovilla varð borin í heim í 1889 í Ecuador og varð fríggjadagin søgd at vera heimsins elsti núlivandi persónur.

Tað var familja hennara sum sendi føðibrævið hjá Mariu til rekordbókina.

Maria hevur sera góða heilsu, hon sær gott út og hevur aldrin brúkt stav. Hon lesur bløðini og hyggur eftir sjónvarpi, sigur Kate White hjá Guinness Rekord bókini til Reuters.

Maria eigur fimm børn og hon er bæði omma, langomma og olduromma.

Hon gjørdist einkja í 1949, og býr nú saman við syni sínum og verdóttrini í sama landsbýi, har hon var borin í heim fyri 116 árum síðani.



*Hon sær væl út – heimsins elsta, tann 116 ára gamla Maria Esther Capovilla úr Eucador*

Fuglafjarðar kommuna:

## Jón Nolsøe Olsen nýggjur havnameistari

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við at havnameistarin Kristian Oluf Christiansen gevst í sínum starvi vegna aldur og Jón Nolsøe Olsen tekur við tann 1. januar 2006, verður í hesum sambandi boðið til almenna móttøku á havnaskrivstovuni týsdagin 13. desember 2005 millum kl. 10.00 og 12.00.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Christian Joensen**, ættaður úr Skopun, búsitandi í Tórshavn, fór úr Landssjúkrahúskapellinum sunnukvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin varð úr Vesturkirkjuni mánadagin kl. 13.00.

## Dagurin í morgin

**13. desember. Lucia**, deyð umleið ár 300. Ung genta úr Syracus í Sikiloy. Hon var trúlovað heidnum ungum manni, men narraði hann, varð klagað fyri kristnu trúgv sína og tikin av døgum. Siðurin við luciugongum við gentum við tendraður ljósi í hárinum er komin úr Svøríki. Navnið Lucia kemur av latínska orðinum *lux*, sum merkir ljós.

## 50 ára føðingardagur

Týsdagin 13. desember verður Marjus Dam, lækni, Miðvágur, 50 ár.

Føðingardagin verður opið hús í heiminum frá kl. 19,30.




## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Hallgerð Didriksen**
Vestmanna

doyði og varð jarðað.
Vit takka tykkum, ið hjálptu til við kórseting, jarðarferð og við ervinum.
Takk fyri kransar, blómur, heilsanir og gávur til eldrasambýlið.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið í eldrasambýlinum.

*Fyri tey avvarðandi*
**Àsa, Gyðja, Fríðhildur og Rói**